**Fiskimálaráðið**

Dagfesting: 24. oktober 2017
Mál nr.: 17/00480-1
Málsviðgjørt: USW/KM

**Uppskot til**

# Kunngerð
# um
# gýtingarfriðingar í føroyskum sjógvi

Við heimild í § 9, stk. 2, nr. 3 og § 40, stk. 2 og 3 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum broytt við § 6 í løgtingslóg nr. 92 frá 13. juni 1995, løgtingslóg nr. 64 frá 20. mai 1996, løgtingslóg nr. 84 frá 6. juni 1997 og løgtingslóg nr. 69 frá 18. august 1998, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um veiðibann á gýtingarleiðum í føroyskum sjógvi.

*Friðaðar leiðir*

**§ 2.** Veiða er ikki loyvd á teimum í stk. 2-7 nevndu leiðum og tíðarskeiðum.
*Stk. 2.* Á leið 1, í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 15. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi røð, veiða við línu og snellu uttan fyri 12 fjórðingar úr grundlinjunum tó undantikin:
1) 61°40,000’ N, 08°25,000’ V
2) 61°54,000’ N, 08°40'000’ V
3) 61°54,000’ N, 07°25,500’ V
4) 62°00,000’ N, 07°15,000’ V
5) 61°53,000’ N, 07°04,000’ V
6) 61°45,000’ N, 07°04,000’ V
7) 61°40,000’ N, 07°16,000’ V
8) 61°40,000’ N, 08°25,000’ V
*Stk. 3.* Á leið 2, í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 15. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi røð:
1) 62°24,000’ N, 07°15,000’ V
2) 62°22,000’ N, 07°21,000’ V
3) 62°10,000’ N, 07°48,000’ V
4) 62°19’000’ N, 07°48,000’ V
5) 62°28,000’ N, 07°27,000’ V
6) 62°29,000’ N, 07°24,000’ V
7) 62°30,500’ N, 07°15,000’ V
8) 62°24,000’ N, 07°15,000’ V
*Stk. 4.* Á leið 5, í tíðarskeiðinum frá 15. februar til 15. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi røð:
1) 62°20,000’ N, 07°15,000’ V
2) 62°26,000’ N, 06°48,000’ V
3) 62°34,500’ N, 06°48,000’ V
4) 62°30,500’ N, 07°15,000’ V
5) 62°20,000’ N, 07°15,000’ V
*Stk. 5.* Á leið 7, í tíðarskeiðinum frá 15. januar til 1. apríl, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi røð, veiða við línu og snellu tó undantikin:
1) 62°20,000’N, 05°45,000’V
2) 62°20,000’N, 05°25,000’V

3) 62°15,000’N, 05°25,000’V
4) 62°09,000’N, 05°40,000’V
5) 62°09,000’N, 05°50,000’V
6) 62°20,000’N, 05°45,000’V

*Stk. 6.* Á leið 8, á Føroya Banka, í tíðarskeiðinum frá 1. mars til 1. mai, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi røð:

1) 60°57,330’N, 07°57,000’V
2) 61°03,000’N, 07°57’000’V
3) 61°15,500’N, 08°16,000’V
4) 61°13,330’N, 08°42,200’V
5) 61°00,000’N, 09°11,000’V
6) 60°48,666’N, 09°25,000’V
7) 60°26,000’N, 09°08,416’V
8) 60°36,500’N, 08°45,000’V
9) 60°45,666’N, 08°37,000’V
10) 60°57,333’N, 07°57,000’V

*Stk. 7.* Á leið 9, í tíðarskeiðinum frá 1. desember til 1. mars, báðir dagar íroknaðir, er ikki loyvt at veiða innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi røð:

1) 61°40,000’N, 09°10,000’V
2) 61°40,000’N, 09°40,000’V
3) 61°15,000’N, 09°40,000’V
4) 61°15,000’N, 09°25,000’V
5) 61°30,000’N, 09°15,000’V
6) 61°40,000’N, 09°10,000’V

*Revsireglur*

**§ 3.** Við sekt verður tann revsaður, ið fremur brot á § 2, er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg.

*Stk. 2.* Er brot framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt verða revsað við sekt.

*Stk. 3.* Sambært § 45, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap kann Vørn beinanvegin taka inn fiskiloyvið, um skiparin á fiskifarinum er skuldsettur fyri brot á hesa kunngerð, ella um fiskifarið hevur fiskað meir enn tí er loyvt sambært fiskiloyvi ella sambært hesi kunngerð. Fiskiloyvið kann verða tikið aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildiskoma*

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Samstundis, sum henda kunngerð kemur í gildi, fara úr gildi kunngerð nr. 23 frá 16. mars 2005 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum fyri skip úr Noregi og ES-londum og kunngerð nr. 4 frá 9. februar 2006 um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert